Kravgonga í Kollafirði

Umleið 600 fólk gingu hóskvøldið kravgongu úr Bygdarhúsinum í Kollafirði fram til rundkoyringina Frammi í Dal. Tey kravdu at sleppa at halda upp á rætt sín at vera í verkfalli, uttan at løgregla ella aðrir myndugleikar leggja uppí

ARBEIÐSMARKNAÐUR
Edvard Joensen

Kollafirði: Undirtøkan var fullkomulig, tá arbeiðarafeløgini í verkfalli savnaðu blokaduvaktirnar í Bygdarhúsinum í Kollafirði hósdagin. Og fyri at vísa, at vekt og meining er aftan fyri tiltøkini, fór øll gongan ein túr fram í Dal at hyggja at staðnum, har løgreglan kvøldið fyri rak blokaduvaktirnar burtur.

Tað kemur ein stór gonga inn eftir gamla bygdarvegnum í Líðini í Kollafirði. Sum ein risastórur ormur kemur gongan skríðandi við javnari ferð inn eftir vegnum. At hetta eru verkafólk í mótmælisgongu, skilst beinanveg, fremri endin nærkast. Har ganga leiðararnir í Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag fremst. Formenninir og nevndarlimir. Og so koma øll hini aftaná.

Fundur hevur verð í Bygdarhúsinum, har røtt hevur verið um, hvat nú er til ráða at taka. Fundurin var bara fyri tey, sum staðið høvdu blokaduvakt, og annars varða av arbeiðarafeløgunum, sum eru í verkfalli. Ikki vilja tey siga nakað um, hvat gjørt verður annað enn, at enn er ikki tíð til hallar heim at venda.

Vilja stríðast

Nei, tað skilst á Ingeborg Vinther, formanni Føroya Arbeiðarafelags, at her er nógv eftir at stríðast fyri.

– Og tað fara ogur eisini at gera. Tað kanst tú b.... uppá!

Tað liggur eitt so hulisligt smíl yvir teimum, tá spurt verður, hvat sagt varð á fundinum, og hvat ætlanin nú er.

Ingeborg Vinther vil ikki siga annað enn, at nú veðrur farið ein gongutúr inn eftir vegnum.

– Tað er so hugnaligt at spáka eftir vegnum í frið og náðum og njóta hetta góða veðrið, sigur hon við einum heldur spotskum brosi.

– Ogur fara at ganga inn til rundkoyringina. Men onga »ballade«. Tað er ikki ogra stílur.

Men tað skilst á øllum brøgdum, at hetta er helst meira enn bara ein friðarligur gongutúrur, sum nú verður farin.

Við royndunum frá mikukvøldinum í mentu, verður hetta av summum líka nógv roknað sum ein styrkiroynd mótvegis løgregluni, sum nakað annað.

Tað verður sagt í rúgvuni, at tað er ikki óvist, at løgreglan fer at handtaka Ingeborg og kanska eisini Vígdis Johannesen, forkvinnu í Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Men sum skilst, ætlar fólkið ikki, at tað skal ganga so, um hagar til kemur. Tey hava gjørt av í allari stillheit at lata tær báðar hvørva inn í miða fólkarúgvuna og síðan stúgva seg tætt saman um. So tað skal gerast so trupult sum gjørligt at finna tær.

Friðaligt

Javnt og støðugt fer gongan inn eftir landsvegnum á Langasandi. Strekkir seg inn eftir Mýrunum og kemur til rundkoyringina.

Eitt sindur ivast tey fyrstu, hvat nú er at gera, men tey ganga so bara runt. Og runt, og einaferð aftur-at, og so framvegis, til øll eru komin uppí.

Bilarnir eru á veg til hús. Halin leingist rættiliga skjótt eftir tunnilsvegnum út eftir Oyrareingjum. Út móti Langasandi standa teir, og fram í Dal er halin eisini farin at leingjast. Tó er hann ikki so slangur her. Kanska tí tað vanliga koma færri bilar tann vegin beint eftir arbeiðstíð, ella kanska tí, at teir hava tann møguleikan, at teir kunnu venda og halda til Havnar eftir Oyggjarvegnum.

Tað kemur róp í, tí har er knappliga ein bilur, sum vil troka seg í gjøgnum rúgvuna. Men hann sleppur ongan veg, tí har er ov tjúkt fyri. Roynir at fara skeivu megin rundkoyringina, men verður steðgaður. Onkur gerst beinanveg eitt sindur mælskur í rúgvuni, men við tað sama eru onnur, sum fáa tey niður aftur á jørðina.

Tað gongur út móti einum tíma, so halda leiðararnir, at nú er tíð at gevast hesaferð og fara út aftur til Kollafjarðar.

Boðað er aftur til fund seinnapartin fríggjadagin. Hann verður ikki so fjølmentur sum hesin. Men tað tykist eingin ivi vera um, at fakfelagsleiðararnir, sum eru í verkfalli, fáa stuðul frá sínum limum.

Hundur í óføri

Lyftubilurin hjá sløkkiliðnum í Havn var hóskvøldið boðsendur at koma at bjarga einum hundi, sum stóð í óføri í Kaldbak

BJARGAFERÐ
Edvard Joensen

Kaldbak: Brandmenninir í Havn eru minst líka fittir sum teir í teknirøðini við Dunnaldi og teimum úr Dunnuvík. Teir í Dunnuvík plaga at bjarga kettum niður úr elsteyrum. Teir í Havn bjarga hundum, so óviljað er farnir til bjargar.

Tað situr ein forskrektur hundur á eini hill í klettinum í grótbrotinum innan fyri Kaldbak. Hann hevur tað ikki gott, stakkalin. Er stutt sagt hundabangin.

Har hevur hann sitið einar tríggjar tímar. Hann er lopin niður av eggini og sleppur nú hvørki uppella niður.

Ein kaldbaksmaður fór inn í eitt hús oman fyri grótbrotið, har hann hevur kríatúr. Hann hevði hundin við, og hesin gekk uttanfyri.

Tá maðurin var liðugur við síni ørindi í húsinum, var hundurin horvin, og helt maðurin, at hann mundi vera farin til hús. Men so var ikki, og seinni varð hundurin funnin í berginum. Sitandi sum ein annar bjargafulgur einsamallur á eini lítlari hill í klettinum.

Boð vórðu send eftir sløkkiliðnum í Havn, sum kom við stóra lyftubilinum. Og eigarin saman við tveimum brandmonum varð lyftur upp í bergið, har hyndurin sat.

Hundurin var týðuliga illa við av støðuni. Hann hevði hug at flyta seg eitt sindur. Kreyp og var so bangin, at onkur teirra, sum stóðu niðri á vegnum niðri undir og eyleiddu hesa bjargingarroyndina, óttaðist fyri, at hann kanska fór at loypa út av av berari ræðslu.

Men hann kennir tó harran, og hesin fekk sissað hann so mikið, at hann rakk honum og fekk hann inn í lyftina, har hann aftur var í tryggum hondum, meðan brandmeistarin sjálvur loraði lyftuna niður aftur á slætt.

Vinnudagur í Norðurlandahúsinum

ÁRSINS VIRKI

Aftur í ár skipar Vinnuhúsið fyri einum vinnudegi í Norðurlandahúsinum. Á vinnudegnum fært tú møguleika at tosa við vinnulívsfólk og høyra vinnulívsfólk greiða frá teirra royndum og hugsanum. Sum ein fastur táttur verður ársins virki valt. Seinasta ár var luttøkan stór - gev okkum tí boð um tina luttøku í góðari tíð.

Seinasta freist at melda seg til er 28. mai.

Vinnudagurin fríggjadagin 1. juni 2001

VINNUHÚSIÐ
House of Industry
R. C. Effersøesgøta 30, FO-100 Tórshavn, Tel 31 18 64, Fax 31 72 78, industry@industry.fo

Stuðlað Vinnudegnum hava

ATLANTIC AIRWAYS · FØROYA SPARIKASSI · KAUPTHING · STATOIL · FØROYA BANKI · Shell

Skrá fyri vinnudagin:

Kl. 14.00
Wilhelm Johannesen,
formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag
bjóðar velkomin

Kl. 14.10
Bjarni Djurholm,
landsstýrismaður í Vinnumálum
hugleiðir um vinnumynstur í framtíðini

Kl. 14.30
Ognarviðurskiftini í føroyskum vinnulívi.
Jørn Astrup Hansen,
stjóri Føroya Banka

Kl. 15.00
Føroysk alivinna og útlendskar ílagur – møguleikar og hóttanir.
Frímund Hansen,
stjóri Vestlaks

Kl. 15.30
Steðgur – Kaffi

Kl. 16.00
De velstabiliserede virksomheder og E-business.
Johan Schrøder,
stjóri Radiometer

Kl.16.40
"Surprise" ræðari

Kl. 17.20
Stuttur steðgur

Kl. 17.30
Ársins virki 2001
verður valt

Kl. 18.00
Liðugt í Norðurlandahúsinum

Kl. 19.30
Galladeguriði
á Hotel Føroyum

Meira um tiltakið er at finna á heimasíðu okkara www.industry.fo